# Førari: Bussurin koyrdi ikki

**Førarin av bussinum upplivdi als ikki hendingina, soleiðs sum hini bæði vitnini. Hann greiðir í telduposti til undirritaða frá, at bussurin ongantíð fór á rull**

FERÐSLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Førarin av býbussinum, ið fyrradagin dró eina kvinnu eftir vegnum, upplivdi als ikki hendingina soleiðs, ið undirritaði skrivað hana í gjár. Hann hevur í telduposti greitt undirritaða frá hendingini, soleiðs sum hann minnist hana.

»Eg hoyri eitt bump, og vendi mær við og síggi, at ein eldri kvinna er dottin uttanfyri bussin, orsaka av at tað var hált og ikki saltað enn. Eg skundi mær aftur í bussin, hjálpi damuni upp á beinini og inn at sita. Eg spyrji, um eg kann hjálpa henni, men hon svarar ikki. Kanska botnar tað í, at eg tosi danskt og hon føroyskt. Tá eg havi tryggja mær, at hon hevur skilt meg, men síggi at hon ikki ger tekin til at tørva hjálp, velji eg at seta meg aftur og koyri avstað.«

### Dyrnar mugu vera afturlatnar

Hann greiðir víðari frá, at dyrnar í bussunum mugu verða afturlatnar, skulu bussarnir kunna koyra.

»Um tað, ið varð skrivað í avísini, veruliga var hent, hevði kvinnan ikki verið før fyri at fara úr bussinum í Steinatúni, men hevði tá heldur havt brúk fyri eini ambulansu. Men tað, ið verður lýst í blaðnum, letur seg als ikki gera. Tá tað eru hurðalás á øllum hurðunum í bussinum, kann bussurin als ikki flyta seg, uttan at allar dyr eru afturlatnar á fullgóðan hátt.«



Førarin av bussinum vil vera við, at bussurin ikki koyrdi, og at dyrnar mugu vera afturlatnar skal bussurin kunna koyra



Rógvi Sosialurin

Fra: [redacted]
Til: [redacted] <rogvi@sosialurin.fo>
Sendt: 28. oktober 2008 20.48
Emne: Angående en episode med en bybus

Til Sosialurin.

Jeg har netop læst den artikel i avisen i aften omkring et tilfælde, hvor en passager angiveligt er blevet slæbt flere meter efter en bybus. Da det er mig, der var fører af denne bybus, føler jeg mig i min ret til at forklare min side af sagen, da den påstående episode slet ikke er noget jeg kan genkende.
Jeg stopper ganske rigtigt ved stoppestedet på bakken overfor Ísdaragøta og passagererne forlader bussen og nye kommer ind. Jeg hører et bump og vender mig om og ser at en ældre dame er faldet udenfor bussen grundet at der var glat og ikke saltet endnu. Bussen holder stadig stille. Jeg skynder mig ned i bussen, hjælper damen op og ind og sidde. Jeg spørger til hende. Hun siger ikke noget. Jeg spørger om jeg kan hjælpe hende, men hun svarer ikke. Måske bunder det i, at jeg taler dansk og hun færøsk. Da jeg har sikret mig, at hun har forstået mig, men ser at hun ikke gør tegn til at have brug for hjælp, vælger jeg at sætte mig igen og køre fra stedet. Da vi når stienatún, stiger kvinden ud af bussen og går sin vej.

Hvis det, der er blevet beskrevet i avisen, virkelig skulle være foregået, ville den pågældende dame ikke være i stand til at forlade bussen i steinatún, men derimod have haft behov for en ambulance. Hvis det beskrevne virkelig var sket, havde passagererne i bussen ringet til politiet som det første. Men det beskrevne kan slet ikke lade sig gøre. Da der er dørlås på samtlige døre i en bus, kan bussen slet ikke bevæge sig medmindre alle døre er forsvarligt lukkede.

Kærligst buschaufføren.

## Stjórin:

# Taka neyðugu fyrilitini

**Magni V. Mouritsen, stjóri í Mouritsens Bussar, harmast um hendingina, har ein eldri kvinna varð drigin nakrar metrar eftir einum bussi, og sigur, at teir taka neyðugu fyrilitini**

FERÐSLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Beint eftir hendingina, har ein eldri kvinna varð drigin nakrar metrar eftir vegnum, við øðrum beininum innanfyri hurðina í bussinum, fingu Mouritsens Bussar boð um hendingina, og fóru alt við eitt undir at kanna tilburðin út í æsir.

Magni V. Mouritsen, ið er stjóri í Mouritsens Bussar, greiðir frá, at teir eftir at hava tosað við allar partar í málinum, nú fara at taka neyðugu stigini til tess at fyribyrgja, at slíkt hendur aftur.

- Tað er ótrúliga óheppið, tá slíkt hendur, og vit eru ótrúliga harmir um hendingina. Tí taka vit neyðugu fyrilitini, soleiðs at vit framyvir eisini kunnu veita eina góða og trygga tænastu yvirfyri borgarunum og kommununi, sigur Magni V. Mouritsen, stjóri í Mouritsens Bussar.

### Óvist við hurðalásinum

Bussførarin, ið førdi býbussin, greiðir í telduposti til undirritaða frá, at bussurin als ikki kann koyra, uttan at allar dyrnar eru latnar aftur á fullgóðan hátt. Men hetta tykist enn vera óvist.

Magni V. Mouritsen greiðir frá, at tað eru ikki allir bussarnir, ið hava hetta hurðalásið, og at tað møguliga ikki er sligið til í nøkrum av bussunum. Hann fær tó hvørki váttað ella avsannað, hvørt hurðalásið var sligið til í bussinum, ið eftir øllum at døma dró eina eldri kvinnu nakrar metrar eftir vegnum, men velur at taka støði í frágreiðingunum frá øllum íblandaðum pørtum í hendingini.

# Vitni setir spurnartekin við trygdina

**- Um tað er so, at bussførarin ikki sær um fólk eru á veg inn ella út úr bussinum gjøgnum bakdyrnar, er veruliga stórur vandi á ferð, sigur Tove Askham, ið sat inni í bussinum, ið fyrradagin dró eina eldri kvinnu eftir vegnum**

FERÐSLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Ein onnur kvinna, Tove Askham, ið sat inni í bussinum, sum fyrradagin dró eina eldri kvinnu nakrar metrar eftir vegnum, greiðir frá teirri skelkandi hendingini sum verandi meira ósketni enn óhapp. Hon sá eisini kvinnuna, ið er 82 ára gomul, koma gangandi tvørtur um vegin frammanfyri bussinum.

- Men tá hon kemur til fremru hurðina, er hurðin afturlatin, og noyðist hon tí inn gjøgnum bakdyrnar. Tað er ikki altíð at bussførarar lata fremru hurðina upp, og hví so er, veit eg ikki. Hon noyddist tí inn gjøgnum bakdyrnar, og tá hon hevur fingið annað beinið innum, klamsa dyrnar aftur, og bussurin byrjar at rulla. Tá eg síggi hetta, slái eg paniskt á rútin, ið er frammanfyri mær, og geyli um at steðga bussinum. Tá bussurin so er steðgaður, og eg síggi kvinnuna liggja har, liggur hon mestsum undir bussinum, frá miðjuni og niður. Hevði bussurin koyrt longri, og hon var dottin úr, hevði hon heilt víst endað undir hjulunum, sigur Tove Askham, ið eisini vitnaði hendingina.

### Setir spurnartekin við trygdina

Tá bussførarin hevur steðgað bussinum og kemur til bakdyrnar, tykist hann bæði óhøviskur og arrogantur. Hann spyr, hvat gongur fyri seg har, og tykist meira irreteraður, enn hjálpsamur. Harafturat pástendur hann, at hann ongan møguleika hevur at síggja, hvat gongur fyri seg við bakdyrnar, og at tað er ógjørligt hjá honum at síggja. Tað er eisini júst hetta, ið skelkar hana mest.

- Um tað er so, at bussførararnir ikki síggja hvat gongur fyri seg við bakdyrnar, tykist tað fullkomiliga óforsvarligt at bara nýta tær dyrnar. Eg hugsi mest eisini um bussarnar, ið steðga í Steinatúni, har nógv skúlabørn fara í og úr bussunum. Um bussførararnir ikki kunnu síggja hvat gongur fyri seg við bakdyrnar, og bert velja at lata tær upp, er tað mestsum ótrúligt, at eingin vanlukka er hend, greiðir Tove Askham frá.

